Hanus Kamban í takkarrøðu:

# Virðislønin - ein stórur heiður

**– Eg skal ikki dylja fyri, at tað kenst sum ein stórur heiður at fáa hesa virðisløn, og tað er mín vón, at tað fer at eydnast at lata okkurt munagott aftrat aftur fyri henda stuðul, segði Hanus Kamban millum annað í takkarrøðu síni, tá hann hevði fingið heiðursbræv og blómur fyri Mentanarvirðisløn Landsins**


*Jógvan á Lakjuni handar Hanusi Kamban heiðursbræv fyri Mentanarvirðisløn Landsins*
Mynd: Jens Kr. Vang

TAKKARRØÐA
*Hanus Kamban*

Eitt tað fyrsta minnið, eg havi um skaldskap og bókmentir, er frá tíðini, tá vit í barnaárunum plagdu at fara upp á gólvið í okkara húsum suðuri í Skúgvi. Vit vóru (og eru) fýra beiggjar, og vit dansaðu viðhvørt okkurt vetrarkvøld í køkinum, meðan mamma og pápi hugdu at og lurtaðu. Tað fyrsta kvæðið, eg minnist meg hava lært, var Ámunds ríma, eitt av kvæðunum um Karl hin Mikla, tann franska keisaran, sum føringar róptu Karlamagnus. Í kvæðinum verður Ámund, sonur hin mauriska Angulund kong, dripin av Rólanti, sum er systursonur Karlamagnusar. Til at bera Angulund kongi høvdið á soninum verður valdur tann franski Gýðin jallur, sum seinni vísir seg at vera svíkjari. Um hetta sigur kvæðið soleiðis frá:

*Tað var Angulund kongurin*
*alla gleði misti,*
*tríggjar reisur á einum sinni*
*blóðugt høvur kysti.*

Í Føroyum hava vit mong kvæðir um Karlamagnus. Men teir lærdu siga okkum, at bara nøkur teirra – umframt hesa Àmunds rímu m.a. Geipa táttur og Runsivalsstríð – eru tey upprunaligu kvæðini. Hvussu er og ikki, so kunnu vit staðfesta, at Karl hin Mikli – Charlemagne – rúgvaði nógv upp í huganum á føringum frá miðøld og upp at okkara døgum. Um vit fara víðari eftir hesum tráði, so minnast vit, at Karlamagnus var mikil europeari, kanska tann fyrsti sanni europearin, ein – gaman í eirindaleys – men samstundis politiskt savnandi og mentunarliga byggjandi persónsmenska.

Vit tosa og skriva í dag nógv um at byggja Europa og gloyma tá kanska, at Europa sum mentunarligt hugtak er gamalt. Og mong gloyma kanska eisini, at ikki bara tær stóru tjóðirnar í miðjuni, men eisini tær mongu, smáu nær miðjuni ella í útjaðaranum – eitt nú Kekkia, Estland, Ísland og Slovenia – spegla aftur hetta sama hugtak. Eisini á okkara oyggjum skyggir henda spegilsmynd. Kári P. speglar aftur europearan, ella tann europeiska amerikanaran, Bob Dylan, Regin Dahl tolkar við sínum løgum Karlfeldt, Laxness, Burns, Grundtvig og Goethe, í Janusar skaldskapi sæst farvegur av Platon, Poe og Fröding, og kvæðina spegla aftur søgu Norðurlanda, søguna hjá gotum og húnum, Karlamagnusar europeiska ríki.

Tað serliga við hesum skaldskaparhugtaki er, at tað er alra manna og alra kvenna ogn. Annaðhvørt vit nema skaldskapin sum tekst, við lesnaði ella við at lurta – ella við, sum føringar gjørdu og gera, at taka hendur saman og sláa ring – so verður her ikki spurt eftir kyni, trúgv, politikki ella ognum. So ólík vit annars á mangan hátt eru, so eru vit øll her javnlíkar.

Og fara vit longur eftir hesi slóð, so síggja vit, at allur sannur skaldskapur vísir veg úr tronga – tjóðskaparligum, trúarligum og mentunarligum – fram ímóti margfeldi, opinleika og tolsemi. Í áðurnevnda ørindi vísti tann muslimski Angulund kongur seg at vera eitt menniskja, við somu faðirkenslum sum tann kristni Karlamagnus. Í sínum sjónleiki um Nathan hin Vísa javnsetir tann týski rithøvundurin Gotthold Ephraim Lessing jødadóm, kristindóm og islam og skoðar fram at eini tíð, tá hesir og aðrir átrúnar síggja virðið hvør í øðrum og fáa gott grannalag. Men tað merkisverda er, at eisini eitt gamalt føroyskt kvæði megnar at pallseta avbjóðingar, sum leika á eisini í dag og kanska serliga aftan á tann 11. september 2001. Um hesa somu avbjóðing syngur kanadiska skaldið Leonard Cohen, við orðum eftir Frank Scott, í síni seinastu fløgu:

*The lesser loyalties depart,*
*And neither race nor creed remain.*

*Reshaping narrow law and art*
*Whose symbols are the millions slain,*
*From bitter searching of the heart*
*We rise to play a greater part.*

Hesi fáu og fátæku orð eru ein roynd at gera vart við trý virðir: tað dionýsiska sum neyðugan tátt í einihvørji mentan, skaldskap sum ogn hjá okkum øllum og tolsemi sum neyðsyn, um okkara heimur skal hava nakra framtíð. Vit teimum fari eg at siga Jógvani á Lækjuni mentamálaráðharra og nevndini fyri Mentanarvirðisløn Landsins eina hjartans takk fyri hesa virðisløn. Eg skal ikki dylja fyri, at tað kenst sum ein stórur heiður at fáa hesa virðisløn. Og tað er mín vón, at tað fer at eydnast at lata okkurt munagott aftrat aftur fyri henda stuðul. Takk fyri.


*– Hetta kenst sum ein stórur heiður, sigur Hanus Kamban*
Mynd: Jens Kr. Vang



# Kamban og Hátún heiðraðir

**Nakað av fólki var møtt í Klingruni í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið, tá ið landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, á almennum hátíðarhaldi handaði Hanusi Kamban, rithøvundi og Ólavi Hátún, kórleiðara, heiðursbræv fyri ávikavist Mentanarvirðisløn Landsins og Heiðursgávu Landsins**


*Hanus Kamban fekk heiðursbræv fyri Mentanarvirðisløn Landsins og Ólavur Hátún fekk heiðursbræv fyri Heiðursgávu Landsins*
Mynd: Jens Kr. Vang

HEIÐURSLØNIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Líkindini hjá fólki, sum høvdu áhuga fyri tiltakinum, vóru vánalig við kavaroki og hálku. Haraftrat rann okkurt annað tiltak í Havn, sum eisini hevði stóran áhuga, saman við tiltakinum í Norðurlandahúsinum.

Báðir virðislønarvinnararnir, Hanus Kamban og Ólavur Hátún, vóru hjástaddir við hátíðarløtuna, sum Havnarkórið, Jóannes Andreasen og onnur settu sín serstaka dám á.

Sjálvar peningagávurnar, sum knýttar eru at hesum virðislønum, eru latnar fyrr í summar, og í Norðurlandahúsinum fríggjakvøldið fingu vinnararnir heiðursbræv og blómur.

Tað var Jóan Petur Hentze, ið starvast á Mentamálaráðnum, sum beyð vælkomin. Síðan sang Havnarkórið, »Ljós yvir landið«, hjá Hans Andrias Djurhuus.

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, las fyrst upp grundgevingarnar fyri at lata Ólavi Hátún Heiðursgávu Landsins. Tá ið Ólavur hevði fingið heiðursbræv og blómur, helt hann eina sína takkarrøðu.

Havnarkórið sang nú sangin, »Holli eingil«, sum Steen Steensen Blicher hevur skrivað, og Hanus Kamban hevur týtt til føroyskt. Hetta er helst fyrstu ferð, at sangurin er framførdur alment, men hann hevur áður verið sungin til eitt nú jarðarferðir.

Síðan las mentamálaráðharrin upp grundgevingarnar fyri at lata Mentanarvirðisløn Landsins til Hanus Kamban, og tá ið rithøvundurin hevði fingið heiðursbræv og blómur, fór hann á pallin og helt sína takkarrøðu, sum vit prenta í blaðnum í dag.

At enda sang Havnarkórið kantatuna, »Fedranna tala«, eftir Heðini Brú.

Heiðursgáva Landsins er upp á 75.000 krónur og Mentanarvirðisløn Landsins, sum er hin størsta av sínum slagi í Føroyum, er uppá 150.000 krónur.


*Havnarkórið setti sín serstaka dám á við sangi*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Grundgevingarnar fyri heiðurslønunum

**Hvør í sínum lagi hava Hanus Kamban og Ólavur Hátún útint listarlig og tónleikalig avrik sum hava uppiborið hesar virðislønir**

HEIÐURSLØNIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mentanarvirðisløn Landsins verður latin føroyskum listafólki, sum tøkk fyri útint listarligt avrik. Tann, sum fær virðislønina, skal hava skapað listarligt verk á høgum listarligum støði.

Hanus Kamban fær hesa virðisløn fyri skaldskap og fjøltáttað bókmentavirksemi.

Í grundgevingini fyri at lata Hanusi virðislønina, sigur nevndin, sum hevur latið landsstýrismanninum tilmæli:

»…at eyðkent fyri skaldskap Hanusar serstakliga í stuttsøgunum er ivin, tað ótrygga – døpurhugin – ofta í tilveruskiftunum millum barnaár, unglingaár og vaksnamannaár«.

Nevndin vísir eisini á bókmentaligu ævisøguna um J. H. O. Djurhuus, »…ið hevjar seg upp í føroyskum bókmentum sum sjáldsamur dýrgripur«. Aftrat hesum hevur Hanus Kamban við innliti sínum í fremmandan skaldskap verið føroyska skaldaheiminum dyggur í kjaki bókmentaliga, listaliga og mentanarliga.

Heiðursgáva Landsins, sum Ólavur Hátún fekk, verður latin einstaklingi, felag ella fyritøku sum tøkk og viðurkenning fyri at hava framt avrik, ið hava ella hava havt serstakan stóran týdning fyri føroyska list, mentan og mentanarlív.

Ólavur Hátún fær Heiðursgávu Landsins fyri sítt lívsstrev fyri føroyskum kórsangi og kórvirksemi.

Í grundgevingini sigur nevndin, »…at Ólavur hevur verið slóðbrótari og íbirtari og hevur áhaldandi lagt lunnar undir føroysku sangmentanina. Hann hevur breitt føroyskan kórsang, tónleik og skaldskap út um lond, og hevur somuleiðis givið føroyskum kórsangarum fjøltáttaðar og mennandi avbjóðingar – og samstundis bjóðað áhoyrarum í Føroyum varandi mentanarligar upplivingar«.


*Hóast líkindini vóru vánalig fríggjakvøldið, hevði nakað av fólki leitað sær í Norðurlandahúsið fríggjakvøldið, tá ið heiðurbrøvini vórðu handað Hanusi Kamban og Ólavi Hátún*
Mynd: Jens Kr. Vang